

# Formula søkir eftir samskipara

**Endamálið hjá Formula er at skapa meirvirði fyri kundan. At skapa meirvirði fyri kundan krevur munagóða samskipan, og tí søkja vit nú eftir enn einum samskipara.**

Starvsøkið fevnir um at samskipa uppgávur innanhýsis og mótvegis kundunum. Tú kemur at samstarva við forritarum, ráðgevum og kundum, tá ið nýggjar loysnir skulu mennast og setast í verk.

Tú ert fyrikomandi, hevur lætt við at tosa við fólk og ert álitisvekjandi. Tú sært loysnir heldur enn trupulleikar og arbeiðir sjálvstøðugt og málrættað.

Tú hevur royndir innan bókhald, og kunnleiki til Microsoft Dynamics NAV er ein fyrimunur.

Tú verður ein partur av deildini Søla & Samskipan. Arbeiðsumhvørvið er spennandi, har arbeitt verður tvørtur um fakmørk, og har fakligu avbjóðingarnar eru í hásæti. Á deildini hava vit nógv um at vera, og tí skalt tú kunna hava fleiri bóltar í luftini í senn.

Góðir møguleikar eru fyri persónligari menning, og vit bjóða kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving.

Umsóknin við prógvum skal sendast til Maju Højgaard Jakobsen á teldupostadressu **mja@formula.fo**.

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at senda ein teldupost til áðurnevndu teldupostadressu.

Umsóknarfreistin er 14. februar 2011.

**formula**

Formula | Stiðjagøta 11 | Postboks 1078 | FO-110 Tórshavn | Tel (+298) 344000 | www.formula.fo

# FÍGGJARLEIÐARI

## til Rúsdrekkasølu Landsins

Rúsdrekkasøla Landsins søkir eftir fíggjarleiðari. Landsfyritøkan hevur spennandi avbjóðingar og menningarmøguleikar fyri framman, og tú fært týðandi leiklut í strategisku framstigum okkara. Tú verður við í leiðslubólkinum og vísir beinleiðis til stjóran.

Fíggjardeildin hevur ábyrgd av øllum fíggjarviðurskiftum hjá Rúsdrekkasøluni. Deildin stendur fyri grundleggjandi uppgávum sum roknskapum, fíggjarætlanum, fíggjarstýring og frágreiðingum. Deildin hevur eisini um hendi tey krøv, sum áløgd eru landsfyritøkuni í sambandi við almenna fyrisiting.

RÚSDREKKASØLA LANDSINS

### Útbúgving og førleikar

- tú hevur leiðsluroyndir og royndir við at stýra eini fíggjardeild
- tú hevur hægri útbúgving í búskapi
- tú hevur hollar royndir við fíggjarstýring og fíggjarætlanum í Navision
- tú hevur innlit í viðkomandi lógir og reglugerðir
- tú dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga

### Persónligir eginleikar

- tú hevur eitt skipað arbeiðslag
- tú vísir ábyrgd og hevur dirvi at taka avgerðir
- tú sýnir virkisfýsni og víðskygni
- tú dugir at raðfesta og at halda ásettar freistir
- tú hevur jaligan hugburð og ert liðspælari

Til rætta fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv á eini landsfyritøku, sum er í støguðari broyting. Tú fært sera góðar møguleikar fyri bæði fakligari og persónligari menning.

### Løn og setanartreytir

eru sambært sáttmála millum Búskapar- og løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið. Starvið hevur eina royndartíð á 6 mánaðir.

### Send tína umsókn

við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum við teldubrævi til emo@rusan.fo ella við vanligum brævi til Rúsdrekkasølu Landsins, Postboks 3069, FO 110 Tórshavn, att: Elsa Maria Holm Olsen. Skriva frámerkið "Fíggjarleiðari" uttan á vanliga brævið.

Umsóknarfreistin er týsdagin 15. februar 2011 kl. 12.

SENDISTOVAN